Smidligari umsiting gevur fleiri møguleika

Hans Albert Hansen
valevni sambandsfloksins í Havn

Sitandi samgonga er av andstøðuni løgd undir óreglusemi í virksemi sínum, millum annað tá tað snýr seg um at halda ásettar byggisamtyktir. Hvørt hald er í hesum kann eg ikki taka dagar ímillum, men stundum kann tað verða skilagott at gera broytingar í samtyktunum, tí umstøðurnar kunnu verða broyttar við tíðini. Tað er tó givið, at mistøk altíð vilja koma fyri, óansæð hvør situr við valdið í byráðnum, tí tann ið einki mistak ger, ger oftast ov lítið. Tað er hinvegin umráðandi fyri álitið millum borgarar og býráð, at somu mistøk ikki verða endurtikin. Tískil er umráðandi at hava eina innanhýsis góðskuskipan ið kann endurskoða møguligar feilir ið verða gjørdir, fyri síðan at taka neyðug stig til at broyta mannagongdirnar, so hesi mistøk ikki koma fyri aftur. Hetta vil í longdini góðska politiska og kommunala arbeiði, samstundis sum tað vil menna álitið millum borgarar, politikkarar og umsiting.

Føroyski búskapurin ið bert hevur hálvt annað bein at standa á er serliga viðbrekin. Tí er umráðandi, at umsitingin er smidlig og skjótt kann tillaga seg búskaparligur sveiggini, soleiðis at vit í verri tíðum, uttan ov stór fíggjarlig inntriv, kunnu klára tær neyðugu kommunalu skyldurnar, sum eitt nú barnaansingina, eldrarøktina og aðrar sosialar skyldur, sum altíð skulu verða í lagi. Tað er ein sannroynd, at umsitingar hava lyndi til at skapa meiri arbeiði til sín sjálvs enn neyðugt. Hetta viðførir at fíggjarorkan hjá kommununi í ávísan mun verður bundin og tí ikki verður brúkt optimalt. Vit eiga tí hyggja eftir, hvørjar arbeiðsuppgávur og tænastur skulu gerast av kommununi og hvørjar eiga at verða lagdar út til tað privata, eisini tí, at kommunan sum útgangsstøði ikki eigur kappast við privatu vinnuna. Ein fyrimunur við hesum er eisini, at uppgávur ikki verða umbidnar fyrr enn veruligur tørvur er á teimum. Á hendan hátt minkar kommunan um sínar føstu útreiðslur og kann tí í størri mun enn áður, tillaga virksemið eftir búskapinum, samstundis sum fleiri ressourcir tá verða tøkar til onnur endamál.

Skúlaverkið

Inga Dahl
Valevni fyri Fólkaflokkin

Skúlarnir í Tórshavnar Kommunu er ov trongir til allar næmingarnar, bæði tí at barnatalið veksur og ikki minni tí nútíðar undirvísing setur onnur krøv enn eina skúlastovu til hvønn flokkin.

Fleiri eru flokkarnir, sum ganga í skúla seinnapart, alt gott um tað, men nógv foreldur ynskja heldur at børnini byrja í skúlanum um somu tíð, sum foreldrini fara til arbeiðis.

Átrokandi er at loysa hølistrupulleikan á Argjum, sum skjótast, annaðhvørt tað verður við bygging ella keypi.

Býráðið hevur samtykt, at skúli skal byggjast í nýggjastu útstykkingini, Hoyvíkshagi Suður.

Henda byggingin má ikki seinkast.Tá fólk fara at flyta inn har, má skúli vera komin.

Tá ein so stórur býlingur verður bygdur eftir stuttari tíð, er av alneyðugt, at har ikki bara eru hús, men eisini onkur savnandi miðdepil, sum er fyri øll. Hetta hevur týdning fyri samleikakensluna hjá børnum og ungum, og tá er skúlin ein góð byrjan.

Ikki minni týdning hevur tað fyri samleikakenslluna, at børnini kunnu ganga í skúla í nærumhvørvinum sum longst.

Hetta er ikki minst galdandi fyri Kaldbak og Kollafjørð og tær bygdirnar, sum nú eftir valið koma upp í Havnar Kommunu.

VIÐMERKINGAR

Reinur og fríður býur – eisini um veturin!

Hjørleif Hjaltalin
Valevni fyri Fólkaflokkin til Tórshavnar býráð

Nú nærkast tíðin, tá bilarnir verða skøddir til vetrarhálvuna!

Tórshavnar kommunu nýtur árliga **10.000** tons av asfalti til vegakervið í kommununi! Av hesum verður umleið helvtin nýtt til at bøta um vegirnar, eftir vetrarhálvuna og ein stórur partur av hesum sliti, stavar frá píkadekkum. Hetta slit sæst so aftur sum asfaltsdust og asfaltsevja runt í øllum býnum. Hesari evju hava borgarar í Tórshavnar kommunu liva við, í nógv ár. Hugskot hava verið um at banna nýtslu av píkadekkum í kommuni, og nógv kjak, bæði fyri og ímóti, hevur staðist av hesum.

Um ein partur av peningajáttanini til asfaltarbeiði í staðin varð nýttur til enn betur salting av vegakervinum, so vóru helst nógvir bilførarar, ið ikki valdu at nýta píkadekk. Um bilførarar vistu, at vegakervið í kommuni var effektivt saltað, hví skuldu teir so sett píkadekk á bilarnar? Í staðin fyri við lóg at banna nýtsluni av píkadekkum, so kunnu vit gera umstøðurnar so góðar, at ikki er neyðugt at nýta píkadekk! So kunnu tey , ið veruliga hava tørv á píkadekkum framvegis nýta tey, meðan onnur kunnu nýta vanlig vetrardekk. Vit høvdu fingið ein reinari bý, dálkingin av umhvørvinum bleiv minni og ikki minst, tað vildi eisini minka um ampan av asfaltsdustinum í býnum. Vit kundu so við røttum sagt, **"Havnin skal skína"** !

Børn – ungdómur í Havnini

Charlotta á Váli Olsen
Valevnið Miðfloksins í Suðurstreymi

"Havnin - ein býur har børnini trívast". Hetta var yvirskriftin yvir eitt stak gott og væleydnað tiltak í vár. Henda yvirskrift átti at verið sett ovarlaga á skránna fyri komandi valskeið hjá Tórshavnar kommunu. Tí trívast børnini og tey ungu, kemur tað at hava positiva ávirkan á restina av samfelagnum.

Nú eru bíðilistarnir til dagstovnar burtur og Býurin hevur fingið fleiri nýggjar stovnar til børn. Hetta kunnu vit bert gleðast um. Men tó eru ikki allar súður syftar í tí málinum. Karmarnir skulu til, men trivnaðurin innan hesar karmar eru ikki minni neyðugir. Tí eigur hesin parturin at vera tikin upp og viðgjørdur saman við fakfólki innan sína dagligu gongd innan ymiskar ítróttargreinar og er tað sera gott. Men tað er ikki nóg mikið og heldur ikki eru øll ung til ítrótt. Vit vita, at flestu av teimum hava ymiskar listarligar gávur og hugflog, men kunnu ikki koma viðari, tí pláss er ikki fyri teimum nakra staðir. Margarinfabrikkin hevur gjørt eitt valaarbeiði síðstu tíðina á hesum økinum, tó, har er sera trongligt og karmarnir eru ikki teir bestu. Har skal setast stórt inn uppá at fáa karmarnir til veða undir eini tryggari, rúsfríðari og mennandi skipan.

Tað vaksandi ættarliðið er okkara framtíðarvón.

Største arbeiðsplass í Føroyum

Bjarti Mohr
Býráslimur Fólkaflokkurin

Tórshavnar Kommuna er største arbeiðsplass í landinum.

Fyri komandi fíggjarár 2005 eru út við 100 mió.kr. settar av til íløgur. Hesar íløgur fevna um ymisk arbeiði ið skulu gerast, líka frá bryggjuni til ellis- og røktarheim og skúlar vi? meira. Vanliga kan ein siga at ringvirkningarnir av einum arbeiði eru tríggjar ferðir støddina á arbeiðinum. Tvs. Um vit gera íløgur fyri 100 mió.kr. so vera ringvirkningarnir uml.300 mió. kr. Hetta verður seg lønir, skattir, avgjøld, tilfar, tænastur og keypiorka í samband við tey projektir sum skulu setast í verk. Hesar íløgur koma at virka uppbyggjandi fyri allan búskapin í miðstaðarøkinum.

Tórshavnar Kommuna minnir um Amerika hvar fólk úr øllum ættum savnast fyri at liva og virka saman. Tórshavnar Kommuna er í tí góðu støðu at vit kunnu varveita arbeiðsplássini og skapa enn fleiri, hóast niðurgongd í samfelagnum sum heild..

Fólkaflokkurin vil í verki leiða kommununa á ein sunnan búskap, hvar allir borgarar, ung og eldri, hava eina góða og sterka kommunu at liva í.

Eru tey 35 arbeiðsplássini í Suðuroy, ein stór sápubløðra?

Finnleif Guttesen

Halda teir, løgmaður, landsstýrismenn, løgtingsmenn valdir í Suðuroy og samgongan, suðuroyingar fyri tað turra spott?

Hetta eru viðkomandi spurningar, sum eru stilloaðir áður. Menn tað sýnist, sum omanfyri standandi politikarar eru farnir undir heilt í hesum málinum.

Fleiri suðuroyingar spyrja seg sjálvan nú, um teir eru hildnir fyri gjøldur av teimum fólkavaldu løgtingsmonnunum, landsstýrismonnunum og løgmanni.

Flest allir suðuroyingar vóru fegnir tá ið teir hoyrdu um ætlanina, at byggja ellisheim í Vági, har brúk bleiv fyri 35 almennum arbeiðsplássum, tí arbeiðspláss er ein stór mangulvøra í Suðuroy.

Tað er væl ikki so galið, at samgongan dregur í land, tí ein kommuna, ikki treytaleyst tekur undir við uppskotinum?

Ella var framferðarhátturin frá samgonguni við vilja so ófantaligur, at teir kendu svari, áðrenn fari var úr Tinganesi?

VIÐMERKINGAR

Skulu menn vera við í politikki?

Annika W. Joensen
forkvinna í Javnstøðunevndini

Uppgávan má vera at skapa eitt samfelag fyri øll. Eitt samfelag, sum speglar fólkið og tað fjølbroytni, sum er í fólkinum. Vit umboða hvør í sær okkara kyn og tey áhugamál og tey ábyrgdarøki, vit hava. Vit skulu supplera hvønnannan og skapa eitt fjølbroytt tjak um øll politisk evnir. Tí eru 'felags avgerðir og felags ábyrgd' eitt mál í sjálvum sær.

Ímyndi tykkum, at bert kvinnur vóru í føroyskum politikki. At kvinnur høvdu fingið litið upp í hendi at taka avgerðir fyri alt tað føroyska samfelagið. At tær skuldu tryggja vælferð og framburð fyri fólk, fæ og umhvørvi.

Hvussu hevði virksemið hjá landinum sæð út. Hvar høvdu inntøkurnar komið frá og hvussu høvdu vit brúkt pengarnar, sum komu í landsskassan.

Hetta eru forvitnisligir spurningar. Eg rokni við, at ábyrgdarøkini og áhugamálini hjá kvinnum høvdu verið væl umboðaði í einari slíkari politiskari skipan. Alt annað hevði verið ólogiskt. Eg eri eisini vís í, at fíggjarlógin hevði verið øðrvísi 'skrúvað saman', enn hon er í dag.

Trivnaður hevði ivaleyst verið í fokus. Børnini, tey gomlu, tey brekaðu og sálarligu veiku og tær støku mammurnar høvdu havt betri kor. Tað er ikki vist, at bygningarnir høvdu verið so stórir ella at útgerðin hevði verið so dýr, men menniskjað hevði verið í sentrum. Tað rokni eg við.

Eg rokni eisini við, at lønarlagið í typiskum kvinnuyrkjum hevði verið hægri enn tað er í dag. Ella kanska, at lønarlagið hjá monnum hevði verið lægri enn tað er í dag. Eg rokni ikki við, at tað høvdu verið serskipanir til menn og ikki kvinnur, heldur øvugt kanska. Ja, eg rokni við, at kvinnuligu politikkararnir tilvitaðar ella ótilvitaðar høvdu gjørt mismun eins og eg haldi, at mannligu politikkararnir gera tað í dag. Av teirri einføldu orsøk, at tað hevði borið til.

Hvussu hevði vinnulívið sæð út? Høvdu kvinnurnar hildið lív í vinnum, sum ikki bera seg? Var fiskivinnan høvuðsvinna ella høvdu vit aðrar ella fleiri vinnur at dúva uppá?

Og hvussu við undirstøðukervinum (infrastrukturinum). Høvdu tað verið eins nógvir og góðir vegir og tunlar, sum vit hava í dag, um kvinnurnar ráddu fyri borgum.

Hvussu hevði skattastiginn sæð út? Høvdu vit tosa um skattalætta ella kanska heldur um arbeiðslætta. Hevði størri samanhangur verið millum arbeiðs- og familjulív? Høvdu pápar havt barnsburðarfarloyvi, tikið sjúkradagar og havt ábyrgd av húsarhaldinum á jøvnum føti við mammurnar, ella høvdu mennirnir havt tað í kvinnuveldinum Føroyum? Høvdu teir kent seg virdar ella settar til siðis? Høvdu teir hildið fundur um 'menn í politikki' og hvat høvdu kvinnurnar sagt til tað? Høvdu vit kent okkum móttar ella høvdu vit bjóðað monnunum uppí part.

Eg rokni við, at mennirnir høvdu sagt, at teir ynsktu at taka ábygd, tí tørvur var á, at teirra ábyrgdarøki og áhugamál vórðu hægri raðfest. Eg rokni eisini við, at nógv - bæði kvinnur og menn høvdu hildið, at tað var ikki gott við slíkari ójavnvág. Við øðrum orðum, politiska støðan hevði verið lík okkara í dag.

Men hvussu fæst javnvág?

Vigdís Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti Íslands, segði í sínari røðu á javnstøðuráðstevnuni í mai í Havn, at vinskapur millum kvinnur og menn førir til javnstøðu.

Uppgávan má vera at skapa eitt samfelag fyri øll. Eitt samfelag, sum speglar fólkið og tað fjølbroytni, sum er í fólkinum. Vit umboða hvør í sær okkara kyn og tey áhugamál og tey ábyrgdarøki, vit hava. Vit skulu supplera hvønnannan og skapa eitt fjølbroytt tjak um øll politisk evnir.

Vit skulu hjálpast at. 'Felags avgerðir, felags ábyrgd' er málið.

Og atkveður skulu til. Sum er velja bæði menn og kvinnur mest menn. Stóra avbjóðingin - serliga til kvinnuligu valevnini - er at sannføra veljaran um, at tær duga, kunnu og vilja taka ábyrgd. Við stuðul frá floksleiðslunum skuldi hetta ikki verið ein óyvirkomiligur trupulleiki.

So til spurningin "Skulu menn vera við í politikki?" er svarið "ja - menn skulu vera við í politikki", men ikki einsamallir. Teir skulu samstarva við kvinnur og supplera tær.

Eitt ljóshært høvd í myrkhærda systkinaflokkinum

Í samband við kjakið um fría fosturtøku, kom er í tankar um eitt aftursvar eg fekk frá gamlari konu fyri umleið 30 árum síðan.

Dagny Joensen

Tað er tíðarspill at kjakast um at broyta fosturtøkulógina so leingi sum politisku flokkarnir ikki kunnu semjast um at hava felags støðu til málið.

Vanligt er annars í flest øllum málum, at flokkarnir taka støðu fyri ella ímóti, og út frá hesum viðgerða mál og spurningar, sum hava við samfelagið at gera.

Bert ikki, tá talan er um eymar spurningar. Tá skal hvør tinglimur hava loyvi at hava sína persónliga støðu. Tað er gott agn hjá teimum, sum hugsa um næsta val, men tað er ikki ein demokratisk mannagongd í einum framkomnum samfelag, sum vit helst vilja kalla okkara.

Í samband við málið um fría fosturtøku, verður orðaskiftið vent og snarað, til tað at enda bert snýr seg um, hvørja persónliga støðu tinglimirnir hava. Hvat skulu vit veljarar brúka tað til? Tinglimirnir eru valdir at taka sær av øllum málum, sum hevur við okkara samfelag at gera. Talan er ikki um eitt sjálvtokuborð, har tann einstaki tinglimurin skal hava loyvi at vraka og velja, alt eftir hvat viðkomandi finnur fyri gott.

Spurningur um mannarættindi

Í veruleikanum er frí fosturtøka ein spurningur um sjálvsøgd mannarættindi, at kvinnan skal hava loyvi at ráða sær sjálvari og taka støðu - í hesum føri - til fosturtøku.

Talan er ikki um at trýsta nakað yvir høvið á kvinnum. Flestu kvinnur vilja hava síni børn, men um okkurt er, sum forðar og hon ikki er før fyri at taka ímóti barninum, skal tað ikki verða eitt brotsverk, um hon velur fosturtøku.

Hetta málið likist tí við teimum samkyntu. Verður tann minnilutin góðtikin á jøvnum føti við onnur, halda summi, at so verða fleiri samkynt.

Sama er við málinum um fosturtøku. Fáa kvinnur loyvi til tess, so verða fleiri fosturtøkur.

Tað er tað reina tvætt. Flestu børn eru ynskibørn, og tey verða móttikin við gleði og takksemi. Tað verða tey eisini frameftir.

30 ára gamalt aftursvar

Minnist at eg fyri 30 árum síðan spurdi eina gamla konu um fosturtøku. Mín spurningur var: Hava kvinnur og ungar gentur í Føroyum ongantíð havt fyri neyðini at fáa fosturtøku, tá tær eru komnar skeivt fyri?

Konan suffaði og stardi at mær, sum var eg ikki rættsiktað, men tók seg saman og svaraði: - Onkuntíð hevur eitt ljóst barnahøvd stungið seg inn millum hini myrkhærdu í systkinaflokkinum, men eingin tosaði um tað. Hon nevndi als ikki tær ungu blaðungu genturnar, sum spákaðu við barnavogni.

Hetta var stutt eftir at Danmark hevði innført fría fosturtøku við lóg í 1973. Tá eins og í dag var danska fosturtøkulógin frá 1956 frameftir galdandi í Føroyum.

Við øðrum orðum, øll vita um hesar trupulleikar, men eingin ger nakað við tað. Nú vit skriva 2004, og liva í einum - í aðrar mátar - framkomnum samfelager, er spurningurin ósvaraður.

Seinast nýggja er at ein felagsskapur í Danmark bjóðar føroyskum kvinnum fría ferð til Danmarkar og alt goldið í samband við fosturtøku.

Nøkur halda hetta er í fínasta lagi, onnur halda at fosturtøka skal als ikki verða loyvd. Vit eru aftur við "squer one".

Alt gott at siga um tey, sum halda, at frí fosturtøkulóg ikki skal vera í Føroyum. Tað stendur einhvørjum frítt fyri at vera fyri ella ímóti, men tá hesin spurningur verður gjørdur til eitt mál um kenslur, trúgv og persónliga sannføring, haltar onkunstaðni.

Spurningurin um fosturtøku er eitt politiskt mál um lógarbroyting, sum krevur viðgerð í Løgtinginum. Tað kann als ikki góðtakast, at ein felagsskapur í Danmark leggur seg út í okkara viðskifti. So frægt at sær komnir mugu landsins kosnu politikarar vera, at teir tora at taka málið upp.

Ein Færing!

Mogens Tilsted Christensen
Sognepræst Nordstrømø

Løsning fra Løsning – bist du ein Færing?

Sognepræst Henrik Højlund fra Løsning har måske løsningen!

Kan man løse samfundsbånd til Færøerne?

Således spørger sognepræst Henrik Højlund fredag 22-10 i Kristeligt Dagblad under overskriften "Ich bin ein Færing!"

Evt. link: http://www.kristeligt-dagblad.dk/debat/artikel:aid=231291

Der er nok mange, der kunne tænke sig at løse samfundsbånd til Færøerne.

Mennesker kan løse sognebånd, så de principielt tilhører et andet sogn - eller en anden præst inden for folkekirken.

Men kan man også løse samfundsbånd?

Ja absolut. Åndeligt set kan man sagtens være en færing - og med god grund, skulle jeg hilse at sige.

Færinger er overalt i de kirkesamfund, hvor ordet forkyndes både i Danmark, Norge, Island og på Færøerne.

Og jeg kan med sikkerhed også tilføje, at de har et ganske anderledes kærligt og menneskeværdigt forhold til andre mennesker og livet, end det officielle EU-familiære Danmark har.

Det gælder principielt også angående abort, homoseksualitet og kristendom.

Færinger mønstrer 5 gange så mange kirkegængere i forhold til indbyggerantallet, end Danmark gør i gennemsnit.

Færinger lever 2 år længere i gennemsnit, end danskere gør.

Færinger myrder ikke små børn i flæng. De føder dem normalt og tager sig af dem.

Enhver kan blive ein "Færing" hvor de end bor!

At være ein "Færing" er at leve Gud nær.

Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

Sosialurin